# Ikki sparka eftir tínum egnu, Ingeborg

GERHARD LOGNBERG

Ja nú var Ingeborg Winther formaður í Føroya Arbeiðarafelag og læt ,sum um hon tosaði fyri allar limirnar hjá felaginum. Ingeborg, tað hevur ongantíð verið væl dámt at sparka liggjadi mann, tað er tað sum tú ger. Sandoy er illa fyri upp á nógvar mátar, og tað er arbeiðsfólkið sum svíður við tað. Her er ikki nógv arbeiði, men fólk royna at ferðast um Skopunarfjørð fyri at tjena til lívsins uppihald.

Flakavirkini í Sandoynni hava tað trupult við flutningi, men teir sum eiga hesi virki, kempa mannliga fyri at fáa arbeiði at ganga.

Ingeborg, tú biður løgmann Jóhannes Eidesgaard føra javnaðarpolitikk. Er tað ikki javnaðarpolitikkur at útbyggja landið, er tað ikki javnaðarpolitikkur at gera ein tunnil til Sandoy, er tað ikki javnaðarpolitikkur at gera tunnilin til Hvalbiar nútíðarhóskandi ella Dalstunnilin, Tjørnuvíkartunnil? Eg kundi hildi áfram í tað óendaliga.

Ella hevur samgongan ikki hækka pensjónirnar í hesum samgonguskeiði munandi við samhaldsfasta ella hava vit ikki hækka játtan til skúla? Eg veit so, at Skopunar- og Sandsskúli hava fingið munandi fleiri tímar. Ella ferðaseðlaprísirnir við ferjum og tunnlum lækka munandi, er tað ikki javnaðarpolitikkur? Ella allir batar sum eru gjørdir á heilsuøkinum.

Jú, henda samgongan hevur gjørt nógvar stórar batar sum merkjast, men vit eru so sanniliga ikki komin á mál. Soleiðis er tað bara.

Eg fari so staðiliga at minna tykkum øll, sum í dag royna at boykotta verkætlanina til Sandoy, vælsignaði latið vera, tí samgongan sjálv vísir á, at tunnilin skal byrjast í hesum samgonguskeiði.

Her hava vit eina oyggj, sum hevur í mestan mun sjómenn, arbeiðsfólk, tí tað lærda fólki rýmir av oynni, tí tey síggja onga framtíð.

Kommunurnar hava brúkt mió av pengum fyri at møta avbjóðingini við Sandoyartunnilinum, so góða Ingeborg ikki hegla tínar egnu limir.

p.s. eg fari inniliga at biða samgonguna og alt løgtingi at standa saman um tað, sum veksur um Føroyar og bjargar Sandoyar sýslu.

# Sokrates var jarðarmóðir

HERI MOHR



Í Dimmalætting nr. 129 (9.7.07) hevur Kim Simonsen (KS) eina samrøðu við Jóhannu Andreasen (JA) um ”yvirskot og eitt simpult lív?”

Hóast greinin (samrøðan) er drúgv og útdjúpandi, hevur hann, ið hetta skrivar, ikki skilt eitt kvakk av samrøðuni. Hon hevur lagt eftir seg eina kenslu av frustratión og egnum býttleika, - og tað sigur ikki so lítið.

Við einum fimm-viku skeiði á baki kanst tú kalla teg ”certificeraðan lívscoach”, og um tú vilt taka útbúgving sum ”master í coaching”, tekur tað í minsta lagi fimm ár. Men nógv er at velja í: systemiska coaching, NLP (?hm) coaching, psykodynamiska coaching, kognitiva coaching o.a.m. Av samrøðuni framgongur, at JA er HR-mennari (?hm) hjá Eik Banka, har tað kognitiva er betur skikkað enn t.d. tað filosofiska. Skal hetta skiljast soleiðis, at starvsfólk í Eik Banka fáa kognitiva terapi, sum í stóran mun ávirkar og broytir fatan av og hugsan um umheimin og ein sjálvan, og at framtíðin er treytað av kenslum og gerðum ?

Í samrøðuni fáa vit eisini at vita, at nógvir føroyingar hava hjálp fyri neyðini fyri at fáa javnvág millum ”karrieru, frítíð og familjuna.” Løgið, at arbeiði ikki sleppur við í hesari javnvághjálp. (Karriera merkir vanliga succes í starvi.) Vit fáa eisini eitt og annað at vita um strongd (stress), sum ”telefonir og teldupostur skapa.” Tað kann væl vera, men strongd ger vart við seg á so mongum økjum í mannalívinum og djóralívinum. Nútíðarmenniskjað er t.d. í stóran mun plágað av strongd orsakað av áhaldandi nýggjum teknologiskum og økonomiskum krøvum til tað einstaka individið, og hetta kann, sum frálíður, geva óheppnar kenslur av ikki at vera komin á ta ”røttu hillina”.

Men JA vil vera við, at strongd er ikki smart! Og enska hugtakið simple living sigur hon vera analogt við ynskið hjá fólki: ”eg ynski at liva meira simpult.” Er hetta ikki nakað nógv av tí góða?

Í stuttum kann sigast, at støðið í samrøðuni ”Yvirskot og eitt simpult lív?” er so fløkjasligt - eitt nú við sokratiska spyrjiháttin, tí Sokrates hevði leiklutin sum jarðarmóðir - at tað mest av øllum kann minna okkum um scientology traktat. KS spyr jú eisini í samrøðuni, um coaching ikki er eitt slag av trúgv.

Ber ikki til at lýsa hetta fyribrigdi gjøllari, so vanligi lesarin skilir, hvat ”coaching” snýr seg um ?

# Atlants Tøkni vorðin partur av Senta

**Fyrr í ár var stór samanlegging í føroysku KT-vinnuni, tá ið samtakið NEMA keypti og legði saman fyritøkurnar Farodane og Com-Data og kallaði tær Senta. Nú hevur Senta fingið munandi styrk við førleikamikla Atlants Tøkni**



*Christian Nagata, stjóri: - Við at gera dugnaligu starvsfólkini í Atlants Tøkni til part av Senta, er Senta konsoliderað við munandi meiri vitan, og styrkt er almikið um menningarpartin í fyritøkuni*

TIÐINDASKRIV

“Við at gera dugnaligu starvsfólkini í Atlants Tøkni til part av Senta, er Senta konsoliderað við munandi meiri vitan, og styrkt er almikið um menningarpartin í fyritøkuni, soleiðis at hon nú kann bjóða eina fullfíggjaða tænastuviftu til alt tað føroyska vinnulívið og til privatkundar,” siga Rolf Herup Olsen og Christian Nagata, stjórar í Nema.

Nýggja átakið er eisini ein umráðandi liður í vakstrarætlanunum hjá Senta og týðandi táttur í at styrkja um marknaðarstøðuna hjá fyritøkuni, bæði í Føroyum og uttanlands.

### Um Atlants Tøkni

Atlants Tøkni er ráðgevingar- og menningarfyritøka og varð stovnsett í 2001. Fyritøkan hevur í virki sínum lagt dent á at veita umsitingarligar og tøkniligar KT-loysnir av bestu dygd og hevur verið í støðugum vøkstri síðan byrjan.

“Vit brenna fyri at menna dygdarloysnir. Saman við Senta fáa vit betri møguleikar at veita størri og enn betri loysnir, eins og vit styrkja um sølu og marknaðarliðið,” sigur Yngvi S. Guttesen, nevndarformaður í Atlants Tøkni.

Atlants Tøkni hevur ment fleiri størri skipanir fyri stovnar og fyritøkur í Føroyum og uttanlands. Nevnast kunnu t.d. “Fíggjarlógarskipan landsins,” ið er karmur um alt fíggjarlógararbeiði løgtingsins, “Føroya sporførisskipan,” ið er stýrikervi fyri sporførisupplýsingum í fiskivinnuni, og “Nøglan,” ið er støðið undir øllum vøru- og tænastuveitingum hjá Føroya Tele. Nøglan vann heiðurin “Ársins talgilding” í 2005.

Fram til í dag hava starvast 13 serfrøðingar á fyritøkuni, allir við hægri útbúgving á sínum øki. Hesir verða nú samrunnin partur Senta og ein sjálvsagdur liður í framtíðar menningini hjá einari av Føroya størstu og fremstu KT-fyritøkum.

# Staðanøvn

KRISTIN POULSEN
Fuglafirði

Tað undrar meg stórliga, at ein argjamaður, sum sigur seg vera lærara í føroyskum, skal halda fram við at siga, at føroysk staðanøvn standa óbundin – við bara einstøkum undantøkum.

Lat meg taka burtur úr rúgvuni:

Á Dølunum
Áin Mikla
Áin Svarta
Ánirnar
Barðið
Barmarnir
Bassarnir
Bergið
Boðin
Bollin
Borðan
Borgarin
Borgin – minst seks støð
Búgvin
Búkonan
Byrgið
Bøllurin
Djúpini
Dragin
Drangarnir
Dúgvan
Dyllan
Dysjarnar – nógvastaðni
Eggin – minst seks støð
Endin – nógvastaðni
Ennini
Fjallið – nógvastaðni
Flatnatangin
Flesin – nógvastaðni
Flesjarnar – nógvastaðni
Gálgin
Gjógvin – sum fyrsti liður í nógvum nøvnum
Gleðin
Gluggarnir
Hálsurin Beiski
Hellan
Hellurnar
Heyggurin Mikli – nógvastaðni
Holið – nógvastaðni
Høvdið – nógvastaðni
Høvdin – nógvastaðni
Kagið
Kamarið
Kapilin
Katlarnir
Kellingin
Kirkjan
Klettarnir
Klivarnar
Kloddin
Klubbarnir
Klubbin – nógvastaðni
Kneysurin – meira enn einastaðni
Knúkarnir
Knúkin – nógvastaðni
Knyklarnir
Konan
Kumlin
Leitið
Líðin – nógvastaðni
Lónin
Lónirnar
Lykkjan
Melin
Múlin – sera nógvastaðni
Mýrarnar
Mýrin
Mølin
Nabbin
Nakkurin Langi
Nasin
Navarin
Navirnar
Nevið – fleiristaðni
Nýpubakkin
Nónið
Núgvan
Nøvin – nógvastaðni
Ósin
Reynini – nógvastaðni
Risin
Rivið
Rokkurin
Róvin
Rókin
Ryssan
Sandshavið
Sátan
Skarðið – nógvastaðni
Skeiðið
Skoparin
Skorin – fleiristaðni
Skúvoygin
Slokkarnir
Snatin
Snerran
Snoppan
Snubbin
Spinarnir
Stakkarnir
Stapin – fleiristaðni
Stígarnir
Stongin
Stættirnar
Suggan
Sundini
Tangin á Trøð
Templið
Tungan – fleiristaðni
Túgvan
Tvillingsgjógvin
Tvøran
Urðin – fleiristaðni
Úti á Fløtum
Vatnið – nógvastaðni
Við Gjónna
Vitin
Vørðslan – fleiristaðni
Økslin – fleiristaðni
Øldan
Ørgurnar

Tey flestu av hesum dømunum eru úr føroyska heimsatlasinum og tað eru sjálvandi nógv fleiri, tí tað er minni enn so øll staðanøvnini komin við á føroyakortið, sum vitiligt er. Eg spyrji bara argjamannin: Eru hesi »einstøk undantøk«?